# Eingir hooligans

**– Hóast hýrurin á írum var góður eftir dystin, so hevur tað verið ein stak friðarlig nátt, sigur vakthavandi á politistøðini í Havn**

LØGREGLAN
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Av politistøðini frætta vit, at tað hevur verið ógvuliga friðarligt.

– Vánaliga veðrið hevur sjálvandi dempað góða lagið nakað, tí tað var ikki veður at ganga úti og mala. Fólk sótu inni á ymsu skeinkistøðunum og hugnaðu sær í frið, greiðir vakthavandi frá.

Fleiri av skeinkistøðunum høvdu frammanundan søkt um at hava opið longri enn vanligt. Tí var eisini harður tónleikur spældur longri, enn fólk í Havn eru von við eitt gerandiskvøld.

– Vit fingu onkrar klagur um ov harðan tónleik, frá misnøgdum grannum, men skeinkistøðini høvdu loyvini í lagi, so tað gjørdist ikki við, sigur vakthavandi.

### Fyribyrging

Í allan gjár sóust herlið av væl útgjørdum løgreglumonnum ganga runt í Havnini. Spurdur, um teir væntaðu sær nakran ófrið svarar vakthavandi, at tað gjørdu teir ikki.

– At vit vístu okkum í býnum var bert til fyribyrging. Tá fólk allatíðina síggja løgregluna, so hugsa tey eitt sindur meiri um at skikka sær pent. Tað eru rættiliga strong krøv um trygdina til slíkar altjóða dystir, og írar eru jú kendir fyri at vera rættiliga »engageraðir«, tá tað kemur til fótbóltin. So tað var mest til fyribyrging, at vit gingu so mannsterkir í Havnini, greiðir vakthavandi frá.

Hann sigur víðari, at tey flogførini, sum ikki fingu lent í gjár, allarhelst hava havt teir villastu áskoðararnar umborð.

– Tey, sum komu til Føroyar í góðari tíð, vóru serliga eldri fólk og familjur, sum komu fyri túrins skyld. Og tey vóru sera friðarlig og fitt at práta við, staðfestir vakthavandi.

Hann væntar sær ikki nakran ófrið í dag, hóast fleiri teirra ikki sleppa av landinum aftur.

– Tey, sum skulu avstað í dag, eru farin vestur at bíða, so tað verður neyvan nakar trupulleiki av teimum í dag, sigur vakthavandi at enda.



*Hóast írar fyltu nógv í Havnini eftir landsdystin í gjár, so var náttin ógvuliga friðarlig, frætta vit at løgreglustøðini í Havn*

## Rætting:

Í Sosialinum í gjár stóð skrivað, at tað var eitt omanlop við Gjógv. Hetta er kanska eitt sindur misvísandi, tí omanlopið var á Funnings– og Gjáarvegnum, og ikki í bygdini sjálvari.

**eys**

# Teknikapping um royking

**1200 tekningar komu inn til stóru kappingina, sum varð hildin á torginum í SMS í sambandi við altjóða roykfría dagin 31. mai**

ROYKFRÍUR DAGUR
*Eydna@sosialurin.fo*

Tað vóru Astma- Allergifelagið, Hjartafelagið og Føroya Felag ímóti Krabbameini, ið saman við Apoteksverkinum og Fyribyrgingarráðnum skipaðu fyri degnum í ár.



*Hans Pauli Strøm við vinnarunum av teknikappingini: Barbara Eiriksfoss úr Havn, Fróði Mørkøre úr Klaksvík og Jónhild Magnussen úr Miðvági*

### Teknikapping

Fyri børn var ein stór teknikapping, og staðfestast má, at hon fekk stóra undirtøku. Kappingin var fyri børn upp til 14 ár, og ikki færri enn 1200 tekningar komu inn.

Sum skilst, komu tekningar bæði úr skúlum kring landið, men eisini frá einstaklingum, sum teknaðu heima.

Í sambandi við kappingina vóru tað eisini fleiri lærarar, ið nýttu høvið at undirvísa næmingunum um vandan við royking.

Kappingin var býtt upp eftir aldri í 3 partar, og vinnararnir vóru:

- Í bólkinum børn upp til 7 ár, var vinnarin, Fróði Mørkøre, Klaksvík
- Í bólkinum, 7-10 ár, var vinnarin Barbara Eiriksfoss, Tórshavn
- Í bólkinum, 11-14 ár, var vinnarin Jónhild Magnussen, Miðvágur

### Spurnarkapping

Hóast tiltakið serliga vendi sær til tey yngru, vóru tey vaksnu tó heldur ikki gloymd.

Ein spurnarkapping var nevniliga bæði í Sosialinum og í Dimmalætting til tey vaksnu.

Vinnararnir av kappingini vóru:

1. Ein ferðaseðil frá Atlantic Airways: Sólrun Luid, Trongisvágur
2. Ein gáva frá Landsstýrismanninum í Almanna- og heilsumálaráðum: Isabella Sivertsen, Norðdepil
3. Eitt gávukort uppá kr. 1.000 at nýta í Handlunum í SMS: Oddmar Selfoss, Sørvágur.

Tiltakið í SMS var væl vitjað og góðir møguleikar vóru at nema sær kunnleika um royking.

# Mary kostaði hálvafjórðu millión

**Rokningin, fyri at hava danska krúnprinsaparið á vitjan, er nú blivin almannakunngjørd í Australia. Nærum hálvfjórða millión kr, av australskum skattapengum vórðu nýttir**

KRÚNPRINSAPARIÐ
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Sambært avísini »Australian« er stóra frøðin um at hava Mary og Frederik á vitjan, nú vend til øði hjá møngum australiarum. Tað er nevniliga komið fram, at vitjanin kostaði ikki færri enn 3.436.000 krónur. Og tað er ov mikið – serliga fyri australsku kvinnurnar.



*Krúnprinsessan er ein dýrur gestur at hava, tað hava australiarar sannað, nú rokningin fyri krúnprinsavitjanina har er almannakunngjørd. Rokningin er áljóðandi hálvafjórðu millión av skattapengunum*

### Øvundsjúkar kvinnur

Tað, at ljós nú er kastað á royalu nýtsluna, er serliga orsakað av, at australskar kvinnur, sum fyrr í ár gleddust um heimvendu prinsessuna, nú øsa seg um luksuslívið hjá landssystrini. Og tær eru illar um, at rokningin áljóðandi knappa hálvafjórðu millión krónur, verður send til teirra.

Blaðið »Australian« vísir á, at upphæddin, ið var løgd á borðið fyri vitjanina hjá Charles prinsi var tríggjar ferðir so høg, men eingin hevur tikið ta upphæddina upp á tungu. Blaðið vísir sostatt á, at hóast danska prinsaparið var ein dýrur gestur, so kundu tey verið nógvar ferðir verri.

Millum tungu útreiðslurnar fyri donsku vitjanina, ið australiarar hava goldið umvegis skattapeningin, vóru m.a. tveir serfrøðingar, ið skuldu læra australiarar, hvussu man tekur ímóti kongaligum gestum úr Evropa.

Eisini skuldu hesir serfrøðingar syrgja fyri, at ongar ljótar søgur um fortíð Mary sóu dagsins ljós.

Yvir 600.000 kr vóru nýttar til champagnu, donsk fløgg og annað luksus, í sambandi við fínu vitjanina, og knappar 300.000 kr vóru nýttar til eina móttøku, har jet-settið í australia kundu hitta parið.

Men australiarar eru ikki einsamallir um at gjalda vitjanina. Danskir skattgjaldarar fáa nevniliga eisini ein stóran part av rokningini. M.a. knappar 210.000 kr bert í hotellrokningum.

Vónandi verður vitjanin ikki eins dýr fyri palleba, sum hon varð fyri australiarar. Við okkara strammu fíggjarætlan verða vit ikki bótafør, um ikki skatturin verður hækkðaur munandi, so vit megna at gjalda fyri royalu luksusvanarnar.

# Hundur skammbeit barn

**Brádliga leyp hundurin á, skræddi 13 mánaða gomlu gentuna frá mammuni, og beit hana sera illa. Gentan liggur framvegis á intensivu deild**

HUNDAÁLOP
*eydna@sosialurin.fo*

Eitt 13 mánaðar gamalt barn var mikumorgunin illa bitið av einum rottweilara í Norra.

Lítla gentan fekk álvarsamar skaðar í aðra mjødnina, lærkrikan og lærið, og hon er framvegis innløgd á intensivu deild, eftir eina umfatandi skurðviðgerð mikudagin.

Álopið frá hundinum hendi, tá mamma gentuna skuldi loyva einum rottweilara út í hundagarðin á økinum, har abbi lítli gentuna hevur eina hundaalistøð.

Mamman bar gentuna, men brádliga leyp rottweilarin á, skræddi gentuna frá mammuni og skammbeit hana.

Hundurin er nú avlívaður. Óvist er, hvussu verður við lítlu gentuni.